Búskapur og vinna:

Selja lítlan laks

Norski laksaútflutningurin er minkaður nógv í seinastuni, og seinastu dagarnar er støðan versnað dag frá degi. Tað hevur havt við sær, at nógvir útflytarar hava steðgað søluni.

Trupulleikin er, at laskaprísurin á ES-marknaðinum er so lágur í løtuni. Reglan um minstaprís á norskum laksi til ES ger, at laksurin kann ikki seljast hagar sum er, og tað ger ikki støðuna betur, at summir útflytarar lógliga kunnu selja laks, hóast prísurin er niðan fyri minstaprísin. Her er talan um laks til roykingar.

Formaðurin í norska alafelagnum, Tarald Sivertsen, sigur, at ES-marknaðurin er steindeyður í løtuni. Marknaðirnir í Eysturevropa og í Asia kunnu nýtast, men eisini har eru prísirnir lágir, sigur hann.

Vanliga er hendan tíðin á árinum rættiliga friðarlig á laksamarknaðinum, og sølan plagar at veksa aftur út ímóti páskum. Norsku alararnir bíða nú eftir, at prísirnir skulu hækka aftur, men eingin torir at siga nakað um., nær tað verður.

Fleiri norskir alarar hava eisini trupulleikar við gjaldførinum, nú teir noyðast at bíða eftir betri prísum.

Týsk framgongd

Týskir búskaparfrøðingar halda, at gongdin í landsins búskapi fer at venda nú eftir afturgongd eina tíð. Hagtøl fyri teir seinastu mánaðarnar í fjør vísa, at framgongd hevur verið í vinnulívinum í vestara parti av landinum.

Búskaparfrøðingarir halda tí, at vend fer at koma í búskapin, sum frammanundan var merktur av minkandi framleiðslu og vekstandi arbeiðsloysi.

UTTAN ÚR HEIMI

Arafat hevur grivið sína egnu grøv

Amerikanarar halda, at Arafat hevur gjørt alt ov lítið fyri at steðga harðskapinum. Hendan myndin er úr Jaffa-gøtuni í Jerusalem, sum nú hevur fingið heitið "Deyðans gøta"

Mynd: Reuters

Amerikanska stjórnin sigur nú, at Yasser Arafat hevur oyðilagt sínar møguleikar at gerast leiðari í einum sjálvsstøðugum palestinskum ríki

MIÐEYSTUR
Árni Joensen

- Arafat hevur grivið sína egnu grøv, tí hann hevur stuðlað harðskapinum, og tí hann hevur roynt at smugla vápn. Hann hevði møguleikan at gerast forseti í einum palestinskum ríki um ikki so langa tíð, men lat sjálvur hendan møguleikan gleppa sær av hondum.

So greiður var talsmaðurin hjá Hvítu Húsunum, Ari Fleischer, tá hann í gjár gjørdi støðuna hjá amerikansku stjórnini upp.

- Vit kundu verið komin langt og rokkið nógvum málum, men tann møguleikin er farin, tí teir palestinsku sjálvsstýrismyndugleikarnir valdu at nýta harðskap og at smugla vápn, sjálvt um hetta var í stríð við Oslo-sáttmálan um frið í Miðeystri, segði talsmaðurin hjá George W. Bush, forseta.

"Karine A"

Hann vísti á tilburðin tann 3. januar, tá ísraelsmenn steðgaðu farmaskipinum "Karine A" í Reyðahavinum. Umborð funnu teir eina rúgvu av vápnum. Arafat hevur hildið uppá, at hann visti einki um vápnini, men amerikanska stjórnin vil ikki trúgva honum og sigur, at hon hevur ikki álit á palestinska leiðaranum longur.

Mánadagin ringdi Bush forseti til egyptiska forsetan, Hosni Mubarak, sum vísti á, at hetta er sera álvara er farið at venda palestinska leiðaranum bakið, vissaði Ari Fleischer umheimin um, at amerikanska stjórnin framvegis tekur undir við ætlanini um eitt palestinskt ríki. Men talsmaðurin forsetans legði tó afturat, at hetta er eitt mál, sum verður trupult, og sum fer at taka drúgva tíð.

Í morgin skal serligi Miðeystur-sendimaðurin hjá ST, norðmaðurin Terje Rød Larsen, hitta amerikanskar politikarar, men orðini hjá Bush og talsmanni hansara geva ikki tær bestu vónirnar um nakað framstig.

vevir hildin at vera tann arabiski leiðarin, sum hevur besta sambandið við Arafat. Í telefonsamrøðuni greiddi Bush frá, at hann var vónsvikin av Arafat og vísti serliga á vápnini umborð á tí tikna skipinum.

Hóast USA sostatt av

Al-Qaeda sett í samband við burturflyting

Myndugleikarnir í Pakistan halda, at ein felagsskapur við tilknýti til al-Qaeda hjá Osama bin Laden hevur burturflutt amerikanska tíðindamannin Daniel Pearl.

Daniel Pearl, sum arbeiddi fyri amerikanska blaðið Wall Street Journal, varð burturfluttur í pakistanska býnum Karashi seinasta mikudag.

Pakistanska løgreglan hevur síðani leitað eftir manninum, men í gjár viðgekk ein talsmaður hjá myndugleikunum, at teir vita ikki, hvar tann 38 ára gamli tíðindamaðurin er. Men myndugleikarnir siga seg vera rættiliga vísar í, at felagsskapurin Harkat ul-Mujahedin hevur rænt mannin. Hesin felagsskapur hevur sambært pakistansku myndugleikunum tætt samband við felagsskapin al-Qaeda hjá Osama bin Laden.

Daniel Pearl hevði í tulk og ein hjálparmann við sær í Pakistan, men tá hann mikudagin fór at gera eina samrøðu við umboð fyri ein forbodnan felagsskap, bað hann hvørki tulkin ella hjálparmannin koma við sær.

Úr Norðurlondum:

Ongan stuðul til gravstað

Muslimarnir í Danmark hava leingi havt ætlanir um at fáa sín egna kirkjugarð ella gravstað, og nú vilja teir eisini hava tað almenna at rinda ein part av útreiðslunum av einum tílíkum gravstaði.

Mánadagin var fundur millum umboð fyri muslimarnar og kirkjumálaráðharran, Tove Fergo, men har gjørdi ráðharrin greitt, at staturin fer ikki at rinda stuðul til gravstaðin, sum muslimarnir ætla at gera í Brøndby kommunu. Undanfarna stjórnin var harafturímóti sinnað at veita stuðul.

Muslimsku leiðararnir vóru vónsviknir eftir fundin við ráðharran. Teir halda tað vera rímiligt, at tað almenna stuðlar tiltakinum, tí teir donsku muslimarnir rinda skatt eins og aðrir danskir borgarar. Muslimarnir siga, at avgerðin fer tó ikki at ávirka ætlanina um ein muslimskan gravstað.

Vanlukka í rættin

Norska ákæruvaldið hevur lagt sak ímóti reiðarínum HSD og skiparanum á ferjuni "Sleipner", sum fór á land 26. november í 1999. Vanlukkan kostaði sekstan mannalív.

Ákæruvaldið hevur ákært skiparan fyri grovt ósektni. Verður hann dømdur sekur, kann hann fáa upp í trý ára fongsul.

Reiðaríið er ákært fyri brot á norsku revsilógina, tí ákæruvaldið vil vera við, at trygdarásetingarnar umborð á ferjuni vóru ikki í lagi, og at manningin hevði ikki fingið ta neyðugu útbúgvingina, áðrenn ferjan legði frá landi.

Málið ímóti reiðaríinum og skiparanum kemur fyri í rættinum í august.

Trolvirkið Vónin, spennir seg út:

Byggir nýggjan bygning í Havn og keypir seg inn í Grønlandi

Vónin er ikki eitt felag, sum stendur í stað, men fylgir tíðini og byggir seg út, so hvørt tað er neyðugt. Í løtuni arbeiðir felagið við eini stórari byggiætlan niðanfyri oljutangarnar á Viðarnesi í Havn, og millum jól og nýggjárs undirskrivaði felagið sáttmála við grønlendingar um keyp av einum trolvirki í Nuuk.

Vilmund Jacobsen

P/F Vónin, sum hevur sítt virksemið í Fuglafirði og í Havn, er eitt væl koyrandi felag, sum hevur út við 100 fólk í arbeiði, tá ið mest er at gera.

Tíðin eftir ársskiftið er vanliga eitt sindur deyðlig, men í løtuni eru millum 70-80 fólk í føstum starvi hjá felagnum. Eini 20 fólk arbeiða á virkinum í Álakeri, hini í Fuglafirði. Og tey hava nógv at takast við.

John Poulsen, stjóri á Vónini, sigur, at teir plaga at hava menn, sum eitt nú sigla í Grønlandi og eru heima helvtina av tíðini, til arbeiðis á virkinum, tá ið mest er at gera.

- Hetta eru í flestu førum menn, sum áður hava arbeitt á Vónini. Tað, at teir arbeiða her hjá okkum av og á, gevur íblástur báðar vegir. Teir eru góðir at hava til hjálpar, tá ið mest er at gera, sigur hann.

Stórar ætlanir

Vónin er ikki eitt felag, sum stendur í stað, men fylgir tíðini og byggir seg út, so hvørt tað er neyðugt.

Í løtuni arbeiðir felagið við eini stórari byggiætlan niðanfyri oljutangarnar á Viðarnesi í Havn og gongst sum ætlað, stendur ein nýggjur bygningur liðugur á Viðarnesi við árslok.

- Fyrireikingarnar eru komnar væl áleiðis. Kommunan er í holt við at fylla økið út og gera tað klárt hjá okkum at yvirtaka til 1. apríl.

John sigur, at teir fara at byggja eitt hús í tveimum hæddum, sum er 60 x 25 metrar stórt, og tá ið bygningurin er liðugur at taka í nýtslu, verður virksemið, sum í dag er í Álakeri, flutt oman á Viðarnes. Í ovaru hæddini verður framleiðsla; í niðaru goymsla.

- Hetta er ein stór verkætlan, sum kostar einar 14 milj. krónur, sigur stjórin.

Vónin fer at byggja eitt hús í tveimum hæddum niðanfyri oljutangarnar á Viðarnesi. - Hetta er ein stór verkætlan, sum kostar einar 14 milj. krónur, sigur stjórin, John Poulsen

Eiga og leiga

John sigur, at Vónin er býtt upp í deildir, soleiðis at t.d. botntrolini verða gjørd og viðlíkahildin í Havn.

- Men í bygninginum í Álakeri er alt ov tronligt; har er lítið pláss til at strekkja trolini út. Tí er heldur ikki nóg arbeiðsligt í verandi hølum.

Vónin eigur bygningin í Álakeri saman við Mortani Johannesen, Mortani á Ennibergi.

- Bygningurin var til sølu á sinni, og vit samdust við Mortan um at keypa hann í felag. Síðan hava vit leigað partin hjá Mortani eisini.

Hvussu verður við hesum bygningi, tá ið byggingin á Viðarnesi er liðug, er ikki endaliga avgjørt enn, men hugsandi er, at Vónin fer at sleppa sær av við sín part.

- Nýggi bygningurin verður nógv størri enn verandi, og haraftrat verður hann í tveimum hæddum, vísir John á.

Vónin keypt seg inn í Grønlandi

Men Vónin hevur uppaftur fleiri jørn í "eldinum".

Millum jól og nýggjárs undirskrivaði felagið sáttmála við tvey reiðarí í Grønlandi, sum eiga eitt minni trolvirki har yviri, Qalut í Nuuk.

- Tað vóru grønlendingar, sum vendu sær til okkara og spurdu, um vit vóru sinnaðir at keypa. Vit tóku av tilboðnum, og nú hevur Vónin so keypt 75% av Qalut.

John sigur, at Vónin hevur nógv samstarv við grønlendsk reiðaríir, sum eru "kundar" í Føroyum.

- Grønlendingar meta, at Qalut kann gerast meira nýskapandi saman við okkum, soleiðis at tað eisini verður ein fyrimunur fyri teir. Vit hava nógvar góðar "kundar" í Grønlandi, og hesar virðismeta vit. Tí avgjørdu vit at keypa, og vilja vit verða við til at menna hetta virkið, soleiðis at tað verður á sama støði sum Vónin.

Størri og smærri trol

John sigur, at teir hava verið í Grønlandi og hugt at virkinum, og teir halda, at Qalut hevur eitt fitt hús, sum okkurt gott kann spyrjast burtur úr.

- Har arbeiða nakrir fiskimenn. Teir gera og umvæla trol, bæði størri trol og eisini trol til teir smærru bátarnar, sigur stjóri á Vónini, John Poulsen.

- Tað vóru grønlendingar, sum vendu sær til okkara og spurdu, um vit vóru sinnaðir at keypa. Vit tóku av tilboðnum, og nú hevur Vónin so keypt 75% av Qalut í Nuuk, sigur John Poulsen

Tað gongur upp og niður í fiskivinnuni

Vilmund Jacobsen

Nógv menniskju hava tað soleiðis, at tá ið tað gongur væl, er torført at ímynda sær, at tað nakrantíð aftur fer at ganga illa. Og øvut; gongur illa, sæst neyvan ljós fyri framman.

Men soleiðis hongur gerandisdagurin – og ei heldur lívið – saman. Tað er viðgangur, og tað er mótgangur. Slíkum slepst valla undan.

Í flest øllum viðurskiftum síggja vit hesi fyribrigdi; upp-og niðurgongd, hvørt um annað.

Gólvini gerast turr

Meðan Sosialurin í fyrru helvt av hesum mánaðinum hevði fleiri greinastubbar um, at skip komu aftur av túri, full undir lúkurnar, er støðan nú broytt.

Ikki vist, ti fiskiskapurin er so nógv slakari, men í fyrsta lagi, tí veðrið seinastu dagarnar hevur verið so vánaligt og óstøðugt. Tó kundi okkurt bent á, at minni eisini er at fáa í løtuni.

Men einki er so ringt, at tað ikki er gott fyri okkurt. Tá ið tann nógvi upsin var á marknaðinum herfyri, sóu vit nakrar bumm-sølur. Nú minni kemur upp á land, er væntandi, at prísurin fer uppaftur.

Gongur væl hjá skipunum at fiska, er eisini nógv at gera uppi á landi. Tí merkist tað á flakavirkjunum, nú vánaliga veðrið hevur tarnað fiskiskapinum.

Onkur frílota hevur verið á virkjunum kring landið, og onkur verður eisini seinni í hesi vikuni, tí ov lítil fiskur er á marknaðinum.

Tað er langt síðan, tey hava arbeitt tosk í Vestmanna. Í fjør arbeiddu tey ikki eitt kilo av toski. - Men nú arbeiða tey eina minni nøgd fyri at hava arbeiði gangandi, siga tey ð Fiskavirking í Vestmanna.

Smáar nøgdir

Skipini fáa minni, og tað sæst aftur á landingartøl - unum.

Vesturbúgvin landaði í Vestmanna mánadagin. Teir høvdu stívliga 100.000 pund tilsamans, harav eini 80.000 pund var upsi. Restin toskur, hýsa og onnur fiskasløg.

Fram og Vesturbúgvin hava verið inni við spælskaða, og Fiskavirking í Vestmanna keypti eina minni nøgd hjá Fram. Teir løgdu fiskin upp í Miðvági, tí har skuldu spølini umvælast. Skipini høvdu verið stutt úti, tí ið tey noyddust at bróta túrin av.

- Fiskaarbeiði hevur verið samanhangandi higartil, og vit hava nóg mikið av fiski til meginpartin av mikudegnum. Síðan kemur steðgur í, um eingin landing verður seinni í vikuni, siga tey á Fiskavirking í Vestmanna.

Í Vestmanna hava tey annars arbeitt eitt sindur av toski, sum er farin til portiónir.

- Tað er long tíð, síðan vit hava arbeitt tosk á virkinum. Vit arbeiddu ikki eitt kilo av toski í fjør, bara upsa. Nú royna vit so hetta fyri at hava okkurt at gera, nú minni fiskur er á marknaðinum, siga tey á Fiskavirking í Vestmanna.